# Er drotningin farin út um mark?

**Drotningin hevur seinastu tíðina gjørt vart við seg, tá hon hevur úttalað seg um politisk mál í Danmark, eitt nú um sambandið millum kirkju og stat, og drotningin hevur verið fyri atfinningum í hesum sambandi**

DROTNINGAVITJAN
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Fór drotningin farin út um mark í talu sínari, tá hon hálovaði nýggju yvirtøkulógini? Hendan spurning settu fleiri eftir røðuna hjá drotning Margretu, sum hon helt í Norðurlandahúsinum mánakvøldið.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at drotningin flytur seg á markinum til tað, sum fólk halda vera hóskandi hjá einum monarki.

Tá Margreta drotning fyri stuttum gav eina bók út við egnum meiningum og eygleiðingum, vóru fleiri serfrøðingar og parlamentarikarar, ið vístu á, at drotningin var farin út um mark.

Í bókini gevur hon sínar meining til kennar um fleiri umstrídd mál í danska samfelagnum. Eitt nú ávaraði drotningin ímóti at sundurlima tað tætta sambandið millum kirkju og stat.

### Professari fanst at

Hetta fall mongum fyri bróstið, og professarin í statsrætti við Århus Universitet, Jens Peter Christensen, metti, at drotningin í hesum føri var farin út um markið fyri, hvat hon kann loyva sær at siga alment.

Jens Peter Christensen segði um tað málið, at "praksis er, at drotningin ikki úttalar seg um politisk mál. Øll skipanin byggir á, at hon er ein savnandi figurur. Drotningin er uttan ábyrgd, meðan ráðharrin kann dragast til svars. Tað byggir á, at hon er ein ópolitiskur figurur," segði Jens Peter Christensen við Politiken tann 15. apríl 2005.

Hann metti harumframt, at málið um sambandið millum kirkju og stat var eitt politiskt mál, og tí skuldi hon ikki havt úttala seg um tað málið.

Høgni Hoydal hevur gjørt ilt av sær, og hann legði drotningina undir at bera fram ein politiskan boðskap fyri forsætismálaráðið í røðuni í Norðurlandahúsinum, sum var send beinleiðis í sjónvarpinum. Hann segði við útvarpið, at tað er sera óheppið, at drotningin dróg politisk mál inn í røðuna. Finnur Helmsdal hevur ført somu sjónarmið fram í lesarabrævi.

Stjórnmálafrøðingurin Bogi Eliasen sigur, at brotið í taluni hjá drotningini er á markinum til politiska uppílegging, og tað er sera óheppið.

Vit royndu at fáa fatur á fjølmiðlastjóranum hjá kongshúsinum til eina viðmerking, men hon var ikki at hitta áðrenn evstamark.



Brotið, sum vakti ónøgd:

*"Det færøske folks ønske om og vilje til fuldt ud at tage hånd om samfundets udvikling har netop udmøntet sig i et nyt lovmæssigt grundlag for forholdet mellem Færøerne og Danmark. Den nye ordning bygger på en overenskomst mellem Færøernes landsstyre og den danske regering som ligeværdige parter, og den skaber mulighed for, at de færøske myndigheder med enkelte undtagelser efterhånden kan overtage samtlige sager og sagsområder på Færøerne. Denne vidtgående nyordning afspejler mere end noget andet de nære historiske og kulturelle forbindelser mellem Færøerne og Danmark. Den hviler på bevidstheden om den fælles respekt for de grundlæggende værdier og retsprincipper, der er et væsentligt element i den følelse af samhørighed, der knytter os sammen i Rigsfællesskabet."*

Hetta segði drotningin á føroyskum:
*"Avbjóðingar tróta ikki, hvørki nú í dag ella í tíðini, sum kemur. Eitt nýtt grundstøði til at útbyggja viðurskiftini millum Føroyar og Danmark er júst vorðið til. Gævi tað eydnast Føroyum og Danmark í felag at byggja á hetta grundstøðið, so at tey skyldskaparbond, sum binda okkum saman, framvegis mega verða sterk."*

*Drotning Margreta heldur millum annað, at nýggja yvirtøkulógin er eitt frambrot í sambandinum millum Føroyar og Danmark. Røðan, hon helt í Norðurlandahúsinum mánakvøldið, hevur elvt til kjak*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

"Politiska" røðan hjá drotningini:

# Politikarar eru ójavnir á máli

**Umboð fyri teir politisku flokkarnar eru ójavnir á máli um røðuna, sum drotningin helt í Norðurlandahúsinum mánakvøldið**

DROTNINGAVITJAN
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

### Kristian Magnussen:

- Eg dugi væl at síggja, hví tjóðveldismenn eru argir um hetta brotið í taluni hjá drotningini, men innihaldið generar ikki meg. Eg eri samdur við Drotningini í tí, hon førir fram um yvirtøkulógina, sigur Kristian Magnussen, formaður í tingbólki Javnaðarfloksins.

- Eg hevði ikki mælt drotningini til at umrøtt hatta málið í hasi taluni, um eg varð spurdur áðrenn, men hon skal samstundis eisini hava loyvi at úttala seg.

### Jørgen Niclasen:

- Man gongur í ov trongum skóm, um ein fær ilt av hasum úttalilsinum hjá drotningini. Vanliga sigur hon ikki nógv politiskt í sínum røðum, men hesuferð nevndi hon so yvirtøkulógina, sigur Jørgen Niclasen, formaður í tingbólki Fólkafloksins.

- Tað gleddi mítt sjálvstýrishjarta, tá hon nevndi yvirtøkulógina, tí at handan lógin er eitt amboð at tøma ríkisfelagsskapin, leggur hann afturat. Jørgen Niclasen var ikki ovfarin av, at drotningin nevndi yvirtøkulógina, men hann legði eisini til merkis, at hon ikki nevndi uttanríkispolitisku heimildarlógina, sum Jørgen hinvegin ikki er eins fegin um sum yvirtøkulógina.

### Kaj Leo Johannesen:

- Hatta var ikki ein politisk røða, og drotningin skal hava loyvi at hava eina meining. Eg eri væl nøgdur við røðuna, sum bygdi á forstáilsi og virðing, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins.

- Tað er ikki drotningin, ið hevur drigið politikk inn í hetta málið, men tað er gjørt aftaná, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Kári P. Højgaard:

- Tað er sera óheppið, at vit nú skulu leggja okkum út í, hvat drotningin kann siga, og hvat hon ikki kann siga. Hetta markið er ómetaliga torført at seta, heldur Kári P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum.

- Eg eri ikki samdur í tí, sum drotningin segði, og eg kundi kanska hugsa mær, at tað ikki varð sagt, men eg sigi, sum tað stendur í Luthers Katekismus, at vit skulu leggja tað besta í alt, sigur hann.

Kári P. Højgaard heldur, at tað er sera óheppið, at hetta málið verður tikið upp, nú tá allir teir donsku fjølmiðlarnir umframt miðlar úr øðrum londum seta ljóskastaran á Føroyar.

### Bill Justinussen:

- Hatta var ein politisk røða, og tað er sera vánaligt av forsætismálaráðnum at geva drotningini eina slíka røðu, sigur Bill Justinussen úr Miðflokkinum.

- Tað vanliga er, at øll kunnu fegnast um eina røðu hjá drotningini uttan mun til tín politiska lit, men í hesi røðuni úttalar hon seg um politisk viðurskifti, sum øll ikki taka undir við. Røðan sum heild var fín, men hatta brotið hóskaði seg ikki í hasum samanhanginum, sigur Bill Justinussen.